

# Semilla

# Missiónssunnudagur

28.01.2024

FRELSES ARMEEN FAbU
Frelsesarmeens barn og unge

# Í 2024 er missiónssunnudagur hjá FHbu tann 28. januar.

Missiónsverkætlanin hjá FHbu fyri tíðarskeiðið 2024-2025 kallast Semilla.

Hetta tíðarskeiðið er málið at savna inn 250.000 kr til tríggjar samkomur og skúlan hjá Frelsunarherinum í Dominikanska lýðveldinum.

Vit vóna at so nógv børn og ung sum gjørligt luttaka í hesi missiónsverkætlan.




Missiónssunnudagurin er ásettur til 28. Januar, men um tað er annar dagur sum hóskar betri, er tað sjálvsagt møguligt at flyta innsavningina.

Tilfar er at finna á´:  www.FAbu.no

Her finst tilfar sum lýsir missiónsverkætlanina, kunning um innsavningina, kontonr. og plakatir og lýsingartilfar til sosialar miðlar.

# Hvat er Semilla?

Semilla er navnið á innsavningar verkætlanini hjá FHbu til tríggjar samkomur og skúlan hjá Frelsunarherinum í Dominikanska lýðveldinum.

Hetta er tilboð sum hevur til endamáls, at børn og ung í nærumhvørvinum koma at kenna Gud, fáa heilsugóðan mat, fáa góðan fakligan stuðul og støðuga útbúgving.



Talan er um skúlatilboð við mati, lestrarhjálp og frálæru, herundir frálæru í enskum máli.  Umframt sunnudagsskúla. Skúlin er staðið sum byggir ein jaligan felagsskap, har børnini læra at verða sjálvstøðug, samarbeiða og samskifta.

Semilla er spanskt og merkir fræ.  Fræið er ein mynd uppá  “at spíra og vaksa”. Skúli, útbúgving og heilsugóður kostur eru týðandi fyri vøkstur og menning hjá børnum og ungum.
Evnið fyri missiónssunnudagin 28. januar fellur væl saman við dagsins teksti hendan sáðmanna sunnudagin.

# Bakgrundin fyri missiónsverkætlanina

Frelsunarherurin í Noreg, Íslandi og Føroyum hava stuðlað børnum og ungum í Dominikanska lýðveldinum í mong ár gjøgnum faddur-skipanir til stuðulsbørn.

Mong børn og ung í Dominikanska lýðveldinum koma frá familjum, sum hava sera trong fíggjarlig kor og mong eru hungursrakt.



Frelsunarherurin í Dominikanska lýðveldinum metir, at áleið 40-60% av børnunum, sum tey arbeiða ímillum, fáa ov lítið av mati.
Hetta gongur út yvir teirra evni at luttaka aktiv í skúlanum og megna tí ikki at fylgja frálæruni.



# Hvat fer stuðulin til?

Gjøgnum Semilla verkætlanina ynskir FHbu at stuðla arbeiði millum børn og ung í 3 samkomum og skúlanum hjá Frelsunarherinum í Cotui, Moca og Tres Brazos.



Innkomni stuðulin verður brúktur til at veita heilsugóðan mat, undirvísing, frálærutilfar, dagligan rakstur v.m.
Harumframt fer stuðulin til átøk innan ítrótt, mentanarlig tiltøk og skapandi list, sum menna og ríka børn og ung í Dominikanska lýðveldinum.

FRELSESARMEEN FAbU Frelsesarmeens barn og unge

Semilla

EJÉRCITO DE SALVACIÓN